

*Runavíkar kommuna hevur seinastu árini verið í støðugum vøkstri og menning. Kommunan hevur uml. 3.700 íbúgvar og 140 ársverk, og er í einari positivari menning innan økir, sum mentan, vinnulív, tænastu, undirvísing og íbúgvaraviðurskifti.*

# Fíggjarleiðari
## Runavíkar kommuna

Starvið er tvíbýtt soleiðis at fíggjarleiðarin hevur yvirordnaðu ábyrgdina fyri kommunalu fíggjarstýringini, og er eisini starvsfólkaleiðari. Arbeiðsuppgávurnar, sum viðkomandi kemur at røkja, eru í høvuðsheitum hesar:

**Høvuðsuppgávur:**

Fíggjarleiðsla:
- Leiða fíggjardeildina (Roknskap, búskap, frágreiðingar v.m.)
- Koma við ársfrágreiðing av fíggjarligu gongdini í mun til fíggjarætlan og politiskt settir málsetningar. Frágreiðing í mun til fíggjarætlan skal gerast hvønn mánað.
- Gjaldførisstýring, lønsemismetingar og íløgumetingar.
- Skipa fyri at støðugt optimalisera fíggjarumsiting og veitaraavtalur.
- Kunnað býráðið um týðandi broytingar í inniverandi fíggjarári í mun til ætlaðar útreiðslur og inntøkur.
- Tryggja góðan stuðul til fíggjarstýringina á undirdeildum og um neyðugt skipa fyri upplæring.

Starvsfólkaleiðsla:
- Saman við øðrum leiðarum at tryggja trivnað hjá starvsfólki.
- Saman við starvsfólkunum leggja ætlanir fyri menning hjá starvsfólkunum, fyri soleiðis at styrkja kommunala førleikan.
- Leggja frítíðarætlanir soleiðis, at hetta darvar dagliga kommunala virkseminum minst møguligt.
- Taka avgerðir í starvsfólkamálum, innanfyri teir karmar ið eru ásettir av Býráðnum bæði fíggjarliga og starvsfólkaliga.

**Ynskiligir førleikar:**
- Leiðsluførleikar og góð samstarvsevnir.
- Royndir frá samráðingum og ger av avtalum.
- Royndir innan roknskap og fíggjarstýring.
- Royndir frá verkætlanum og verkætlanarroknskapum.
- Hollan teldutøkniskan førleika.
- Hægri viðkomandi útbúgving.

**Persónligir eginleikar:**

Sum persónur vænta vit, at tú ert neyvur, ágrýtin og miðvísur, tær dámar væl stórar avbjóðingar og tú hevur lætt við at samstarva. Harafturat vænta vit, at tú er fleksibul og kanst arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, tá tað krevst. Tú trívist við at arbeiða ímóti freistum og hevur evnir til at hava ein jaligan hugburð bæði innanhýsis og uttanhýsis.

Løn og setanartreytir annars verða sambært avtalu arbeiðsgevara.

**Nær og hvar:** Umsóknir verða at senda skjótast gjørligt og í seinasta lagi mánadagin 10. apríl 2006 til: Runavíkar kommunu, Heiðavegur 26, 600 Saltangará, tlf. 417000. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Rodmundur Nielsen, Borgarstjóra. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

# Skrivstovufólk til Gøtu Kommunu

Søkt verður eftir skrivstovufólk til kommunu-skrivstovuna í Gøtu, at byrja skjótast tilber.

**Høvuðsuppgávurnar eru:**
- ábyrgd av roknskapinum hjá kommununi
- at føra dagliga bókhaldið
- stýring av debitorum og kreditorum
- journalisering
- fólkayvirlit
- aðrar fyrifallandi uppgávur

**Útbúgving v.m.:**
- viðkomandi útbúgving
- góðan kunnleika til teldutøkni

**Persónligir eginleikar:**

Vit vænta at tann, ið sett/ur verður,
- er ágrýtin og kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur lætt at samskifta við onnur
- hevur góð samstarvsevni

**Setanarviðurskifti:**
- talan er um fulltíðarstarv
- løn og setanarviðruskifti annars eru sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Tann, ið sett/ur verður, má kunna tola, at møguligar broytingar í bygnaðinum hjá kommununi verða gjøgnumførdar, eisini um hesar hava við sær eitt broytt starvsøkið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna, tlf. 44 10 12, ella borgarstjóran á tlf. 21 29 12.

Umsóknir við prógvum, CV og møguligum viðmælum, skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 4. apríl 2006, kl. 12.00.

**Gøtu Kommuna**

Tlf. 44 10 12 · Fax 44 17 74 · www.gota.fo
Við Gjónna 2 · Postboks 40 · FO-510 Gøta

*Hjá kommununi starvast í løtuni 3 skrivstovufólk fulla tíð. Harafturat eru 2 fólk innan teknisku umsitingina knýtt at kommunuskrivstovuni. Bókhaldið hjá kommununi fevnir um allar stovnar undir kommununi, herundir eisini lønarútgjaldingar v.m.*

# Føroya Felag Móti Krabbameini

Aðalfundur felagsing verður á Hotel Hafnia mikudagin 19. apríl 2006 kl. 19.00. Skrá sambært lógum felagsins.

Øll eru vælkomin.

FFK

## SØLUMAÐUR TIL TÍÐARAVMARKAÐ STARV HJÁ P/F FÓM



Vit hava eitt tíðaravmarkað starv sum sølumaður hjá P/F Fóm.

Arbeiðið er frá 1. apríl til 1. september.

Neyðugt er at tú hevur stóra koyrikortið, løn sambært avtalu.

Ring og hoyr nærri.

P/F Fóm · Postboks 154 · 110 Tórshavn
Att.: Sámal Paulason tlf 22 34 52

fóm

Sosialurin 341800

**Arbeiðshandskar**
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi

Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Beinleiðis frá framleiðara

Sosialurin 311820

Spf. **GRAVSTEINAR**




*Opið: mánadag - fríggjadag 9⁰⁰-17⁰⁰ annars sambært avtalu.*

*Nýggj vøruskrá fæst!*

Sjónband - 31 77 74